VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið leygardagin:
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi, um kvøldið minni vindur. Ælingur, partvís vátakavi og hitin millum 1 og 4 stig.



Veðrið sunnudagin og mánadagin:
Sunnudagin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Mánadagin hvassur vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 3 og 7 stig.

Føroysk listafólk í Vejle

Føroyskt og íslendsk listafólk sýna fram í Galleri Epoke í Vejle

FRAMSÝNING
Heri á Rógvi

Saman við tveimum íslendskum listafólkum fara teir báðir Øssur Mohr og Frits Johannesen at sýna fram í Galleri Epoke í Vejle.

Talan er um eina rættiliga stóra framsýning, ið frá 25. í hesum til 22. februar.

Øssur Mohr sýndi síðsta summar fram í Galleri Epoke saman við tveimum dønum, og tey setti seg so aftur í samband við hann.

– Tey ringdu til mín og søgdu, at tey ætlaðu at hava eina framsýning úr Føroyum og Íslandi, og tey bóðu meg finna eitt listafólk aftur at í Føroyum. Eg spurdi so Frits Johannesen, sum eg havt framsýningar við áður, sigur Øssur Mohr.

Teir báðir, Frits og Øssur, eru kendir í Førum. Øssur leggur seg meira eftir ekspressivum landslagsmyndum. Frits nýtir serliga tónleikin til at mynda sína list sum motiv og symbol.

Íslendsku listafólkini eru Liné Ringtved Thordarsons og Helga Kristmundsdóttir, sum sýna ávíkavíst landslagsmálningar og skulpturar.

Fernisering

Leygardagin verður fernisering, og øll listafólkini vera við.

Í hesum sambandi hava Øssur og Frits syrgt fyri, at føroyskar sangur verður at hoyra.

Ein lítil sangbólkur mannaður við Daisy Johannesen, Janet S. Jacobsen og Annvør Abrahamsen fer at syngja norðurlendskar sangir. Jóannes Nolsøe fer at spæla undir.

Frits og Øssur vóna, at nógvir føroyingar í økinum koma á gátt í Galleri Epoke.

Ein av málningunum hjá Øssuri Mohr, ið verður sýndur fram í Vejle komandi mánaðin

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷13
Nuuk	–
Qaqortoq	1
Ammassalik	÷7
Saint John's	÷8
Halifax	÷16
Reykjavík	÷5
Seyðisfjørður	÷8
Tórshavn	0
Lerwick	3
Aberdeen	4
London	8
Tromsø	÷4
Bergen	5
Oslo	–
Stokkhólm	2
Keypmannah.	1
Helsinki	0
Moskva	÷3
Berlin	2
Warzawa	2
Kiev	÷1
Bukarest	1
Paris	7
Madrid	7
Róm	14
Malorca	17
Athen	–
Malta	15
Tunis	15
Beijing	2
New Dehli	19
Bangkok	32
Jakarta	30
Sydney	–
New York	÷6
Miami	20
Los Angeles	14
Meksikobýur	–
Panama	31
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	21

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 985 hPa yvir Norðsjónum fer eystureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 954 hPa í útsynningi úr Hvarvinum fer móti Grønlandsfjørðinum.



Lágtrýstið eystan fyri Hvarvið fer eystureftir tætt framvið Føroyum og brúgvalagið hæðani verður yvir Føroyum hósdagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 22/01 kl. 06⁰⁰– 23/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: ÷1,0°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

AVFALLIÐ



Avfallið: <0,1 mm – mált frá 22/01 kl. 06⁰⁰–23/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 154,7 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

VESTFALLSKYRRINDI

18. jan.: Fullmáni
23. jan.: Mánin næstur jørðini
25. jan.: Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
24. jan	11.07	23.43	10.07	22.43	10.22	22.58	00.44	13.07	01.44	14.07	09.22	21.58	08.22	20.58	11.22	23.58	—	12.22	10.52	23.28	—	12.07
25. jan	—	12.22	11.22	—	11.37	—	01.43	14.22	02.43	15.22	10.37	23.16	09.37	22.16	—	12.37	00.58	13.37	—	12.07	00.43	13.22
26. jan	01.01	13.39	00.01	12.39	00.16	12.54	03.01	15.39	04.01	16.39	11.54	—	10.54	23.19	01.16	13.54	02.16	14.54	00.46	13.24	02.01	14.39
27. jan	02.04	14.30	01.04	13.30	01.19	13.45	04.04	16.30	05.04	17.30	00.19	12.45	11.45	—	02.19	14.45	03.19	15.45	01.49	14.15	03.04	15.30

5 707265 100050 >